UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 19. september 2023
J. nr.: 23/17901
Tygara skriv: **52-021/2023**

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín Didriksen Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

Evni: Útgjaldslágmark í barsilsskipanini

Spurningar:

1. Hvat hevði kostnaðurin verið av at áseta eitt lágmarksútgjald úr barsilsskipanini á ávikavist 5.000, 10.000 ella 15.000 krónur?
2. Hvussu nógvum prosentstigum skal inngjaldssatsurin økjast við hjá hvørjum borgara fyri at dekka økta kostnaðin fyri ávikavist eitt lágmark á 5.000, 10.000 og 15.000 krónur?

Svar
Til spurning 1
Spurt verður, hvat kostnaðurin hevði verið av at ásett eitt lágmarksútgjald úr Barsilsskipanini. Spyrjari hevur nágreinað fyri Umhvørvismálaráðnum, at hugsað verður um øll foreldur, og ikki einans tey, sum eru fevnd av barsilslógini. Umhvørvismálaráðið hevur tó ikki hagtøl um tey foreldur, sum ikki hava verið í Barsilsskipanini. Talan kann vera um foreldur, sum eru í barsli frá lesnaði og fáa veiting frá Studna, ella sum fáa uppihaldsveiting í sambandi við barnsburð frá Almannaverkinum, ella foreldur, ið ikki fáa útgjald úr nevndu skipanum. Barsilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðarskipan, sum rindar barsilspening til tey, ið hava haft A-inntøku seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna vegna viðgongu, barnsburð og ættleiðing. Tí verður einans svarað, hvat kostnaðurin hevði verið, um tey, sum fáa útgjald úr Barsilsskipanini, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald á ávikavist 5.000 kr., 10.000 kr. og 15.000 kr.

Í tíðarskeiðinum 2018-2022 sóu tølini úr Barsilsskipanini soleiðis út fyri tey foreldur, ið fingu lægri útgjald enn ávikavist 5.000 kr., 10.000 og 15.000 kr. um mánaðin.[1]

[1] Móttakararnir av barsilapeningi telja við í tí árinum, tá ið farloyvið endar.

Barsilsfarloyvir endaði í tíðarskeiðinum 2018-2022	Móttakarar um árið í miðal	Dagar (30 dagar/mánað) um árið í miðal	Barsilspeningur um árið í miðal
Útgjald lægri enn 5.000 kr.	34	10.230	988.541,16 kr.
Útgjald lægri enn 10.000 kr.	92	26.110	4.968.063,58 kr.
Útgjald lægri enn 15.000 kr.	180	50.873	15.458.286,27 kr.
Allir móttakarar	947	174.028	119.930.512,74 kr.

Um teir 34 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 5.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald á 5.000 kr., hevði hetta kostað Barsilsgrunninum **kr. 716.459**.

Um teir 92 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 10.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald á 10.000 kr., hevði hetta kostað Barsilsgrunninum **kr. 3.735.336**.

Um teir 180 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 15.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald á 15.000 kr., hevði hetta kostað Barsilsgrunninum **kr. 9.978.114**.

Men lønarlagið broytist, og um bert verður hugt at, hvussu tølini síggja út fyri barsilsfarloyvir, sum eru endað í 2022, sæst, at tað vóru fleiri løntakarar, sum fingu meira enn ávikavist 5.000 kr., 10.000 kr. og 15.000 kr. í barsilspeningi um mánaðin í 2022 enn árini frammanundan:

Barsilsfarloyvir endaði í 2022	Tal av móttakarum	Dagar (30 dagar/mánað)	Barsilspeningur
Útgjald minni enn 5.000	18	5.582	484.291 kr.
Útgjald minni enn 10.000	73	21.152	4.352.634 kr.
Útgjald minni enn 15.000	158	46.494	15.175.600 kr.
Allir móttakarar	987	186.776	139.998.432 kr.

Um teir 18 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 5.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald, hevði hetta kostað Barsilsgrunninum k**r. 446.042**.

Um teir 92 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 10.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald, hevði hetta kostað Barsilsgrunninum **kr. 2.698.033**.

Um teir 180 móttakararnir, sum hava fingið minni enn kr. 15.000 um mánaðin, skuldu fingið eitt lágmarksútgjald, hevði hetta kostað Barsilsgrunninum **kr. 8.071.400**.

Til spurning 2

Spurningurin er svaraður við støði í inngjøldum fyri 2022, sum er seinast lokna roknskaparár. Gjaldskyldug eru øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. Samlaða inngjaldið verður tí brúkt

fyri at rokna, hvat % inngjaldið skal setast til fyri at vinna kostnaðin inn aftur av at seta eitt minsta útgjald. Í metingini eru brúkt miðal tøl fyri kostnað frá tíðarskeiðinum 2018 til 2022.

Útrokning av inngjaldi		
Barsilsgjaldið í 2022 var 0,86%		
Samlað inngjald 2022 var kr. 192.270.212,00 kr.	Nýtt barsilsgjald	
Kostnaður fyri lágmarksútgjald á kr. 5.000 er kr. 716.459	**0,8632 %**	192.986.671,00 kr.
Kostnaður fyri lágmarksútgjald á kr. 10.000 er kr. 3.735336	**0,8767 %**	196.005.548,00 kr.
Kostnaður fyri lágmarksútgjald á kr. 15.000 er kr.9.978.114	**0,9046 %**	202.248.326,00 kr.

Útroknaðu barsilsgjøldini í talvuni omanfyri eru sum sagt roknaði við støði í inntøkunum hjá Barsilsgrunninum í 2022 við verandi barsilsgjaldi og fyri miðal útgjøldini í árunum 2018-2022. Talan er ikki um tøl fyri øll foreldur í Føroyum.

Tórshavn, 19. september 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna